# Tilfeingis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 15.01.2026 |
| Mál nr.: | 25/28459 |
| Málsviðgjørt: | Jm |
| Ummælisfreist: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

(Heimildin at skjóta grágás verður longd)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 66 frá 5. mai um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m., verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2, stk 2, verður “1. januar 2026” broytt til “1. januar 2030”.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. januar 2030.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

**1.1. Orsakir til uppskotið**
Sólseturásetingin, sum loyvdi teimum, ið eiga ella leiga velt lendið, at skjóta grágæs (*anser anser*), er farin úr gildi. Fyri framhaldandi at loyva teimum, ið varða av veltum lendi at kunna skjóta grágæs, sum er til bága fyri landbúnaðin, er neyðugt, at sólseturásetingin verður longd.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Galdandi sólseturáseting gekk út 1. januar 2026.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at loyva, at grágás verður skotin í ávísan mun. Vinnuligur landbúnaður hevur stóran fíggjarligan miss av, at stórir flokkar av grágás eta avgrøðina, men eisini frítíðarlandbúnaðurin er fyri missi orsakað av grágásini. Metingin er, at tað framhaldandi skal verða møguligt hjá hesum bólkum at skjóta grágás undir teimum treytum, sum eru ásettar í løgtingslóg nr. 66 frá 5. mai um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

Lógarbroytingin ferð framhaldandi at loyva, at skotið verður eftir grágás í ávísum førum, men grágásin skal framvegis kunna nørast í landinum, og tí er bara loyvt at skjóta, meðan grágásin situr á veltum lendi. Grágásin verður sostatt framvegis friðað móti skjóting og veiðu á óveltum lendi. Afturat hesum er framhaldandi ikki loyvt at skjóta grágás, meðan hon bølir á eggjum.

Grágásin er fevnd av Bonn-sáttmálanum (Convention on Migratory Species of Wild Animals), sum m.a. ásetur, at villdýrasløg, sum regluliga ferðast um landamørk, skulu verjast, AEWA-avtaluni (Agreement on the Conservation of African-Eurasian Migratory Waterbirds) og sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi (The Convention on Biological Diversity), sum Føroyar hava tikið undir við. At loyva teimum, ið varða av lendi, ið er ávirkað av grágásini, at skjóta grágás, er ikki í sjálvum sær í andsøgn við omanfyri nevndu sáttmálar og avtalur, men tað er treytað av, at hetta er burðardygt. Til tess at fáa greiðu á, um hetta er burðardygt, er farið undir kanningar og vísindaligar teljingar. Búnaðarstovan vísir á, at slíkar kanningar og teljingar skulu gerast yvir eitt áramál upp á umleið fimm ár, um tær skulu kunna brúkast sum vísindaligt grundarlag undir eini avgerð um at skjóta grágás. Tjóðsavnið er vegna Búnaðarstovuna farið undir teljingar av grágásastovninum í Føroyum. Tríggjar teljingar eru higartil gjøgnumførdar, og tað er ikki nóg stórt grundarlag fyri at kunna avgera, hvussu umfatandi ein burðardygg veiða av grágás vildi verið.

Búnaðarstovan metir, at fuglateljingar, sum skulu verða grundarlagið undir eini áseting um, hvat ein burðardygg veiða av grágás er, eiga at verða endurtiknar fimta ella tíggjunda hvørt ár. Alt eftir teimum niðurstøðum, ið kanningar og teljingar geva, kann talan vera um bara at skjóta grágás fyri at verja lendið ella eisini vanliga veiðu eftir grágás.

Taldar grágæs frá 2022 til 2024:

| Ár | Taldar grágæs |
|---|---|
| 2022 | 1128 |
| 2023 | 994 |
| 2024 | 1133 |

Mett verður, at tað framhaldandi skal vera loyvt at skjóta grágás, ið ger skaða á lendi og avgrøði.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Sólseturásetingin, sum var í § 2, stk. 2, verður longd við fýra árum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Upplýst verður, hvørjir myndugleikar, almennir stovnar, privatir felagsskapir, áhugafeløg og onnur hava havt uppskotið til ummælis. Greitt verður í stuttum frá, hvørjar viðmerkingar, ummælispartarnir hava gjørt. Greitt verður eisini frá, hvørja støðu landsstýrisfólkið og stjórnarráðið hava til hesar viðmerkingar. Hetta ger, at møguligar avleiðingar av uppskotinum verða umhugsaðar og lýstar betur.

Um eitt uppskot ikki er sent til ummælis, eigur at verða greitt frá, hvør orsøkin er til tað. Eisini eigur at verða upplýst, um fundir, annað samskifti o.tíl. hevur verið við viðkomandi partar, fyri at bøta um manglandi ummæli.

Eitt ummælisskjal eigur eisini at verða gjørt. Ummælisskjalið er ein stuttur samandráttur av innkomnu ummælunum saman við viðmerkingum hjá landsstýrisfólkinum til hesi. Serliga til uppskot, har nógv ummæli eru komin inn, er ummælisskjal eitt hent amboð, sum gevur greitt yvirlit yvir tey ummælini, sum eru komin inn.

Dømi: Løgtingsmál 51/2019, løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum.

Ummælini verða løgd við sum fylgiskjal til uppskotið. Hvørt ummæli skal í skjal fyri seg, og skjalið skal vera í PDF-sniði.
(Sí nr. 1.2.1.6. í rundskrivinum um lógarsmíð).

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur hvørki fíggjarligar avleiðingar fyri landið ella kommunurnar.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur hvørki umsitingarligar avleiðingar fyri landið ella kommunurnar.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Fyri landbúnaðarvinnuna hevur lógaruppskotið ta avleiðing, at landbúnaðarvinnan lógliga framhaldandi kann fyribyrgja, at grágásin etur grøði á veltum lendi.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk økið í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið gevur jarðareigarum, leigarum og festarum rættindi til at søkja um loyvi at skjóta grágás á veltum lendi.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**

Grágásin er fevnd av Bonn-sáttmálanum (Convention on Migratory Species of Wild Animals), sum m.a. ásetur, at villdjórasløg, sum regluliga ferðast um landamørk, skulu verjast, og av AEWA-avtaluni (Agreement on the Conservation of African-Eurasian Migratory Waterbirds) og sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi (The Convention on Biological Diversity), sum Føroyar hava tikið undir við.

Føroya Fuglafrøðifelag metti í hoyringarsvari til *løgtingslóg nr. 66 frá 5. mai 2021 um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu*, at veiðan eftir grágás, uttan ítøkilig prógv upp á at veiðan var burðardygg, ikki samsvaraði við nevndu sáttmálarnar. Farið er undir fuglateljingar, men tað eru í núverandi løtu bara teljingar fyri 2022-2024, sum eru tøkar. Hetta er ikki nóg nógvar teljingar til, at man kann áseta eina burðardygga veiðu, sum er grundað á ítøkilig prógv.

Tilfeingis- og vinnumálaráðið skal viðmerkja, at tað at skjóta grágás ikki í sjálvum sær er í andsøgn við omanfyri nevndu sáttmálar, men tað er treytað av, at talan er um burðardygga veiðu. Mett verður eisini, at ein avmarkað skjóting kann verða loyvd, so avgrøði o.a. fær frið, meðan neyðugu teljingarnar og kanningarnar verða gjørdar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður, at uppskotið er í samsvari við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli ímillum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sbr. bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap, og *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention.

**2.9. Markaforðingar og flytføri**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at uppskotið fer at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið ásetur ikki skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið ásetur ikki gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri treytir fyri at skjóta grágás, undir hesum nær loyvt er at skjóta grágás, loyvd skotvápn og lóður og fráboðanarskyldu.

Lógaruppskotið heimilar harumframt politinum at krevja, at tann, sum skjýtur grágás, skal vísa politinum loyvið, um biðið verður um tað.

Aðrar heimildir eru ikki í lógaruppskotinum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki myndugleikunum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?**
Lógaruppskotið hevur við sær, at ásetingarnar í § 17 a í *løgtingslóg nr. 66 frá 5. mai 2021 um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu* aftur verða galdandi. Hetta merkir, at Búnaðarstovan fer at viðgera persónupplýsingar, tá tey skulu viðgera umsóknir og afturtøkur av loyvum at kunna skjóta grágás.

**2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

**2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Ásett verður, at sólseturásetingin í *løgtingslóg nr. 66 frá 5. mai 2021 um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu* verður longd frá 1. januar 2026 til 1. januar 2030.

Leingingin av sólseturásetingini hevur við sær, at ásetingarnar í § 17 a í *løgtingslóg nr. 66 frá 5. mai 2021 um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu*, aftur verða galdandi.

Hetta merkir, at tann, sum eigur, festir ella leigar lendið, aftur kann søkja um loyvi at skjóta grágás, um vísast kann á, at grundaðir trupulleikar standast av grágásini.

Trupulleikarnir, ið sipað verður til, er skaði á avgrøði, bæði gras og annan vøkstur, t.d. epli og grønmeti. Ásetingin um, at landsstýrismaðurin gevur loyvi at skjóta grágás, og at landsstýrismaðurin leggur neyvar treytir við hesum loyvi, verður aftur virkin. Ásetingin um, at loyvi at skjóta grágás eru treytað av, at umsøkjarin hevur vápnaloyvi og váttar at kenna fuglin, sum loyvið fevnir um, verður aftur virkin.

Búnaðarstovan fer framhaldandi at umsita loyvini til at skjóta grágás.

**Til § 2**
Ásett verður, at henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og at hon fer úr gildi tann 1. januar 2030.

Tilfeingis- og vinnumálaráðið, 15. januar 2026

**Eirikur í Jákupsstovu**
landsstýrismaður

/ Pól E. Egholm

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: